# Nykurs vísa

1.
Nykurin letur sær klæði skera, –
*– Harra mín –*
tí hann vildi ein riddari vera.
*– Um summarið,*
*tær allir fuglar syngja væl. –*

2.
Nykurin gongur í kirkjuna inn,
prestar hildu messur fimm.

3.
Nykurin gongur á kirkjugólv,
prestar hildu messur tólv.

4.
Elsa lítla smílir undir lín:
"Krist gevi, tann riddari hann var mín!"

5.
Han trådte over skamler en og to:
"Else lille, giv mig tro!

6.
Else lille, troloves mig!
otte borger giver jeg dig."

7.
Else lille rækker hånden fra sig:
"Jeg giver dig tro og følger dig."

8.
Der de komme i rosenlund,
da lyster Else lille at hvile en stund.

9.
"Hør du, ridder, hvad jeg spør dig:
hvor ere de borge, du lovede mig?

10.
"Eitt er í vatni, annað er í sjógv,
fært tú meg, tá hevir tú nógv."

11.
Elsa lítla lítir seg upp í fjøll:
"Eg meini, tú ert eitt nykartrøll."

12. Nykurin leyp í vatnið út –
eftir stóð Elsa (lítla) við sorg og sút.

13.
Nykurin leyp í vatnið kátur,
hálvur maður og hálvur bátur.

14. Skundaði hon so snarliga heim,
hon takkaði Gudi, hon fekk ikki mein.

Vísan stendur í Færøsk Anthologi. Billa Sofia Danielsdatter í Famjin kvað hana fyri Hammershaimb í 1847. Vísan finst ikki í aðrari uppskrift á føroyskum. Annars er hon á fleiri øðrum málum. Nykurin má rýma, tá ið hann hoyrir seg nevndan við røttum navni.